# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Høvdingar hittast

Í morgin er Ríkisfundur í Tinganesi. Ríkisfundurin er eitt løgið fyribrigdi og bert heitið fær ein at hugsa um gamlar dagar, tá ið kongur stevndi vasallum sínum til ríkisfundar. Tað kann uttan víðari staðfestast, at higartil eru eingi stórmál landanna millum loyst á nútímans ríkisfundum. Fundurin er nú einaferð vorðin siðvenja, so hví ikki fáa sum mest burturúr? Í morgin skulu teir tríggir leiðararnir í Ríkisfelagskapinum skifta orð um veðurlagsbroytingar og veðurlagsráðstevnuna COP 15, uppskotið til sjálvstýrislóg fyri Grønland, hvalaveiðumálið, um føroyska leiklutin í Nordisk Globaliseringsforum og um yvirtøkur av málsøkjum. Hetta eru alt sera týdningarmikil mál, sum í sjálvum sær ivaleyst best høvdu verið viðgjørd á fundum, ið høvdu myndugleika til at taka avgerðir.

Hvat grønlendska sjálvstýrismálinum viðvíkur, so er landsstýrið ímóti, at Føroyar verða nevndar í lógaruppskotinum, tí lógin kann gerast tulkingargrundregla ella á annan hátt ávirka viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Hetta er væl skiljandi, men ivasamt er, um hesin fundar er best hóskandi til at avgreiða hesa trætu. Altjóða Hvalaveiðunevndin (IWC) hevur lagt fram uppskot um at gera eitt friðingarøki fyri stórhval í Suðuratlantshavinum. Landsstýrið hevur mótmælt ætlanunum hjá Danmark at atkvøða fyri uppskotinum, tí tað samsvarar ikki við avtaluna um, at Danmark umboðar føroysk áhugamál í IWC. So er tað globaliseringsmálið. Landsstýrið ynskir, at Føroyar og fáa ein virknan leiklut á øllum stigum í norðurlendska samstarvinum um tilgongd í alheimsgerðini. Tað er bara gott, men føroyingar kundu ivaleyst hugðsa sær at vita, hvat landsstýrið sjálvt ætlar við atliti at Nordisk Globaliseringsforum.

Edmund Joensen, fyrrv. løgmaður, er atfinningarsamur mótvegis fundarevnunum og løgmanni. Hann vil vera við, at løgmaður dyrkar ósemjur við stjórnina. Á ríkisfundinum eigur løgmaður heldur at leggja upp til samstarv um mál av veruligum týdningi fyri Føroyar. Hann leggur dent á ES-spurningin og vísir á, at danska stjórnin hevur góð sambond við starvsfelagar í Europasamveldinum. Hon kann tí veita Føroyum hjálp við tættari tilknýti til ES, men her er eingin politisk linja og tí heldur eingin strategi. Alt bendir á, at nakað tíverri er um hetta. Edmund leggur stóran dent á, at ríkisfundurin verður nýttur til at menna samstarvið í ríkinum heldur enn til konfrontatión. Eftir tíðindfundin í morgin fáa vit at vita, hvat ið kom burturúr - um Edmund hevur grein í sínum atfinningum, eins og tað verður spennandi at frætta, hvørja støðu okkara uttanríkisráðharri hevur til eitt fundarúrslit.

**Sosialurin**

## Føroyar í fríum falli

**MARJUS DAM**



Eru teir ikki valdir inn á Løgting at skapa best møguleikar fyri fólk, ið búgva her á landi? Bert 5 mánaðir eftir at loysingarsamgongan tók við, eru Føroyar búskaparliga í nærum fríum falli.

Løgtingsval var 30. januar í ár. Áðrenn gekk framá á flest øllum økjum, hóast trupulleikar vóru á fleiri umráðum orsaka av, at vit hava mist 3 milliardir krónur, tí ríkisveitingin var skerd. Tað merkist á øllum økjum, serliga innan sosial, heilsuverk og skúlaverk okkara.

Flestu munnu vera samd um, at síðan loysingin er sloppin framat eftir valið, væl stuðlað av Javnaðarflokkinum, hevur gingist av skriðuni. Serliga eru tað sjófólk og tann tímalønti ið merkja sviðan av, at akademisku arbeiðaraflokkarnir standa við róðrið.

Fiskavirking Miðvági verður stongd, og 70 fólk send heim - bert í Vágum. Svartiper hjá Fiskavirking verður plantaður niður í Miðvági, har fólk skulu bløða fyri enn eina skeiva avgerð.

Skattir og avgjøld eru hækkaði munandi.

Matvøruprísir og oljuprísir eru hækkaðir nógv. Fiskanøgd og prísir eru lækkaðir nógv.

Tó koma nakrar kommunur at vinna meira pening í keigjøldum, av tí at okkara fiskifloti ikki hevur ráð at loysa.

Samgongan vil hava, at fleiri fólk skulu flyta til Føroya, samstundis sum teir politiskt skapa karmar, ið fáa fólk at flyta av landi í stríðum streymi.

Landssjúkrahúsið hevur fingið at vita, at 32 milliónir krónur skulu sparast í eitt hálvt ár, t.v.s. uml. 5 milliónir krónum um mánaðin, tað ið eftir er av árinum. Strongdin økist í sjúkrahúsverkinum. Fólk orka ikki meira og flýggja í onnur størv. Og sjúklingarnir fáa ikki tað skjótu og góðu viðgerð, teir hava uppiborið.

32 milliónir krónur, sum er peningur, ið skuldi fara til, at sjúkrahúsverkið megnaði at halda verandi støði, verður ístaðin nýttur til at uppbyggja eitt óneyðugt uttanríkispolitiskt prestiguprojekt við ambassadum í m.a. New York og Moskva. Nógv umtalaða "Flaggstongin í NewYork" er nú aftur byrja at spøkja undir leiðslu av Høgna Hoydal, ið nú umsitur uttanríkismál. Um sjúk fólk í Føroyum skulu bera hesa flaggstong tykist nøkrum líka feitt.

Vit síggja her beinleiðis, hvussu fleiri ambassadur merkja enn longri bíðilistar á sjúkrahúsunum. Men loysingarsamgongan hevur prioriterað, at so skal verða. (Tó kenni eg H.P. Strøm so mikið væl, at eg veit, at hann roynir sítt ýtarsta fyri at sjúkrahúsverkið skal fáa sína játtan - men tað hevur so ikki eydnast higartil).

Mong við mær munnu standa spyrjandi um, hvussu skeivt verandi samgonga prioriterar.

Tað tykist, sum politikkurin hjá núverandi samgongu tilvilja ella ótilvilja tekur mótið og virkisfýsni frá føroyinginum við at køva alt í skattum og avgjøldum.

## Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

**RICHARD DANIELSEN**



**28. partur**

Zefanias er tann seinasti av profetunum, sum livdi áðrenn útlegdina hjá Juda, tá ið vit tala um bíbilska røð. Haggai, Zacharias og Malakias, sum koma aftaná honum, livdu eftir báðar útlegdirnar.

Zefanias er einki undantak, hann hevur sama boðskapin sum hinir. Dóm yvir Juda og Jerúsalem, sum kemur av synd. Ein øðiligan dóm yvir heimin. Men eisini lyfti til Ísrael um eina komandi dýrd. Og lyfti til heidnar tjóðir eisini. Bókin byrjar við hesum orðum:

Orð HARRANS, ið kom til Zefanias, son Kusi, son Gedalja, son Amarja, son Ezekias - á døgum Josiasar judakongs, sonar Amons.

Hetta sigur okkum, at dómurin, hann kunngjørdi fólkinum, var beint framman fyri. Frá tí Josias kongur, sum verður nevndur her, doyði, gingu bara eini 22-23 ár, inntil Judaríki fall, og bábelskongur herleiddi fólkið til Bábel. Samstundis kunngerð hann dóm, sum liggur langt frammi í tíðini. 1. kap.1, 2.-3 sigur hetta:

Burt, ja, burt skal Eg sópa alt av jørðini! - sigur HARRIN.

Eg skal sópa burt menniskju og dýr, Eg skal sópa burt fuglarnar undir himli, fiskarnar í sjónum og alt, sum voldir fall, saman við hinum gudleysu; og Eg skal týna menniskjuna av jørðini - sigur HARRIN.

Hetta sigur okkum, at líka sum dómurin, sum lá so tætt framman fyri, gekk út, fer eisini dómurin, sum langt frammanfyri liggur, at ganga út. Sum vit sóu hjá Habakkuk:

Tí enn má sjónin bíða eftir tíð síni; men hon gongur við skundi móti endanum og lýgur ikki. Um hon so drálar, bíða eftir henni! Tí koma skal hon, tað skal ikki svitast. Hab. 2,,3.

Men hví allur hesin ræðuligi dómur. Jú tað er syndin. Zefanias nevnir hetta, sum vit lósu:" Alt, sum voldir fall, saman við hinum gudleysu." Harrin fer at steðga gudloysinum. Harrin steðgaði gudloysinum á døgum Nóa, og hann steðgaði gudloysinum á døgum Lots, hann steðgaði gudloysinum hjá fólkasløgunum, sum Josva og Ísrael tóku landið frá. Her kemur týðuliga fram, at tey fólkasløgini høvdu fylt syndamál sítt. Hygg 1. Móseb. 15,16. Tað, sum serliga kemur fram í hesum førum, sum nevnt er her, er siðloysi.

Jesus okkara Harri og frelsari nevnir Sodoma og Gomorra og eisini um dagar Nóa:

Sum tað gekk á døgum Nóa, so skal eisini verða á døgum Menniskjasonarins.

Somuleiðis, sum tað gekk á døgum Lots: Tey ótu og drukku, tey keyptu og seldu, tey plantaðu og bygdu; men tann dag Lot fór úr Sodoma, regnaði eldur og svávul niður av himli og gjørdi enda á teimum øllum - so skal eisini vera, tann dag Menniskjasonurin opinberast. Lukas 17, versini 26,28,29 og 30.

Vit síggja at boðskapurin, sum Zefanias og hinir profetarnir tala, verður váttaður av Jesusi Kristusi sjálvum.

Hetta er háaktuelt evni í dag.

**Framhald**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og bøða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.